# Fulltrúi til Skráseting Føroya & Tryggingareftirlitið

Søkt verður eftir fulltrúa til skráseting Føroya og Tryggingareftirlitið.

Skráseting Forøya og Tryggingareftirlitið eru fyrisitingarliga skipa saman við Posteftirlitinum, Elveitingareftirlitinum, Kappingareftirlitinum og Fjarskiftiseftirlitinum.

Starvið fevnir í høvuðsheitum um gjøgnumgongd av roknskapum og at hava eftirlit sambært ársroknskaparlógini, tryggingarlógini, lógini um hvítvask, grannskoðaralógini og vinnufelagslógunum annars.

Starvið fevnir somuleiðis um málsviðgerð og leiðbeining av viðskiftafólki okkara í spurningum við tilknýti til nevndu lóggávu og at samskifta við okkara samstarvspartar í øðrum londum.

Arbeiðið krevur gott fakligt innlit, serliga á roknskaparøkinum. Dentur verður lagdur á at tað arbeiðið, ið verður lagið úr hondum er á høgum fakligum støði.

Førleikakrøv eru viðkomandi búskaparfrøðilig kandidatútbúgving, t.d. cand. merc. aud., cand. oecon., ella cand. polit. Royndir innan grannskoðan ella roknskap er ein fyrimunur.

Til rætta fólkið bjóða vit eitt spennandi starv í góðum arbeiðisumhvørvi. Góðir møguleikar eru fyri eftirútbúgving.

Setanartreytir verða eftir galdandi sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Setanin fevnir um Vinnumálaráðið og stovnar undir tí, umfram Løgmansskrivstovuna og onnur stjórnarráð.

Skráseting Føroya – Company Registration Authority

Tryggingareftirlitið




**Bjørt Samuelsen**
*rættarnevndarlimur*

# Javel, hr. statsminister

Tá løgmaður á tíðindafundi í Danmark boðar frá, at uppskotið til stjórnarskipan Føroya væntandi fellur burtur, kolldømir hann Løgtingið. Men sjálvandi kann løgmaður hvørki avlýsa eitt arbeiði, sum løggávuvaldið hevur samtykt skal gerast, ella gera niðurstøður vegna rættarnevndina, sum er sett at finna endaliga semju um uppskotið.

Í tíðindaskrivi frá ríkisfundinum verður sagt at: »Løgmaður legði dent á, at neyðugt er við góðum dialogi um hetta týdningarmikla mál.« So satt er tað, men tíverri hevur løgmaður ongan dialog havt við víðkaðu rættarnevndina, sum nú arbeiðir við uppskotinum frá stjórnarskipanarnevndini. Dialog hevur hann hinvegin havt við danska forsætisráðharran, og kemur við síni niðurstøðu eftir hetta.

## Seks flokkar við

Umboð fyri allar flokkar hava lagt fram uppskotið um stjórnarskipan Føroya, eins og allir flokkar eru umboðaðir í víðkaðu rættarnevndini. Vit hava í nevndini eingi boð fingið um, at ætlanin ikki er at koma á mál við hesum arbeiði. Nakrir fundir nú í juni eru avlýstir, við teirri grundgeving, at formaður og næstformaður eru burturstaddir. Men framvegis er málið – alt tað eg veit um – at nevndin skal skriva álit í summar. Og millum tey mongu, sum skulu til hoyringar í nevndini, er sjálvandi eisini løgmaður.

Tí kom tað ikki bert eitt sindur óvart á, at Kaj Leo Johannesen boðaði donskum miðlum frá at »det ser ud til at det her lovforslag falder bort«. Tilætlað ella ei, so undirgrevur tað sjálvandi arbeiðið í nevndini. Tí hvussu skulu eitt nú tey, sum verða kallaði til hoyringar, fyrihalda seg til eitt uppskot, sum stjórnarleiðarin hevur boðað frá fer at fella burtur?

## Fólkið má sleppa at tala

Yvirskriftin sipar til ta kenslu, ein sat eftir við, aftaná útsagnir løgmans. Tíverri var hetta væntandi, tá at løgmaður av sínum eintingum og uttanum Løgtingið fór og bað danska forsætisráðharran um hansara meting av stjórnarskipanaruppskotinum – áðrenn Løgtingið var komið á mál við sínum arbeiði.

Støðuna hjá dønum hevur løgmaður nú fingið. Men Føroya fólk er enn ikki sloppið at gera av, hvørt vit skulu hava eina stjórnarskipanarlóg sum staðfestir, at evsti myndugleikin at ráða okkum, liggur hjá fólkinum her, eisini tá vit eru í samstarvi við onnur lond. Soleiðis, sum aðrar tjóðir, í líknandi støðu sum okkara, hava gjørt. Og soleiðis, sum tað væl ber til. Um vilji er til tess. Tí politiskur vilji bítur á munandi harðari tilfar enn fýrkantaða løgfrøði.





www.autoservice.fo
**Auto Service**
Undir Krákugjógv 19 · Tel: 34 54 00 · as@autoservice.fo

Keypir tú ein nýggjan bil frá okkum, ført tú GULLPAKKAN ókeypis

NISSAN

B QASHQAI nýtsla (blandað koyring): 11,9-19,2, CO2 129-199 g/km. QASHQAI+2 nýtsla (blandað koyring): 11,9-17,5 km/l, CO2 139-208 g/km. Euro NCAP: 23.05.2007. Prísurin er uttan avhandanarkostnað uppá Kr. 2.550,-. Nýbilsgaranti 3 ár/100.000km, 3 ára lakkgaranti (ongar km avmarkingar), 12 ár ímóti gjøgnumtering. Bilurin kann vera vístur við eykaútgerð.